

## Ferðast til Ísrael

Tey sum ikki hava verið í Ísrael, fáa nú aftur ein møguleika til tess saman við Ísraelsmissiónini. Ein ferð verður hagar í oktober mánaði, har eisini verður vitjað í Jordan. Ferðaleiðari verður Frants Jensen. Seinna ferðin verður á páskum næsta ár, har ein kann uppliva tey heilagu støðini í landinum, umframt møguleikan at uppliva eini páskir í Ísrael, saman við ferðaleiðarunum Petru og Johan Henriksen. Fleiri upplýsingar fáast um ferðirnar á heimasíðuni hjá Ísraelsmissiónini, ið kallast www.israel.fo

## Framsýning á Meginskúlanum

Sunnudagin 28. mars, tað er pálmasunnudagur, fara kvøldskúlanæmingar á Sandoy at sýna fram lutir, sum teir hava tilevnað í vetur. Kvøldskúlin hevur verið á Sandoyar Meginskúla, og her verður eisini framsýningin.

## Flokkar mugu brynja lokalt

Teir politisku flokkarnir eiga at taka betri partar fyri seg og gera valevnislistar í góðari tíð.

Tað helt Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, tá ið uppskotini um valskipan vóru til viðgerðar í Løgtinginum í gjár.

Nógv av prátinum snúðu seg um, at við einum valdømi, verður tað tórført hjá valevnum kring landið at sleppa upp í part.

Men landsstýriskvinnan helt, at hetta kunnu flokkarnir og lokalu valfeløgini gera nakað við.

– Lokalu valfeløgini hava eina megnar uppávu og tað er at geva valevnislistar í góðari tíð, so at valevnini fáa høvi og stundir at gera vart við seg.

Í Danmark gera tey tað og har hava tey eitt heitið, sum er folketingskandidat og tað eru standandi valevni, sum fáa stundir at gera vart við seg, umframt at fólk vita, hvørji eru uppstillað.

-áki-



*Annika Olsen segði, at hon var noydd ar spara og tí bar ikki til at ganga tingsins vilja á møti*

# Floksfelagir vóru eftir Anniku Olsen

**Men landsstýriskvinnan sigur, at hon fekk onki gjørt, tí hon hevði ongar pengar**

VALDØMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Annika Olsen lá sjóvarfallið av sær og hon setti seg upp ímóti Løgtingsins vilja.

Hetta var ákoyringin, sum landsstýriskvinnan í innlendismálum fekk í Løgtinginum í gjár, tá ið uppskotini um valskipanina vóru til viðgerar.

Og ábreiðslurnar komu enntá frá hennara egnu floksfeløgum.

Undir viðgerðini sipaðu báðir fólkafloksmenninir úr Norðoyggjum, Anfinn Kallsberg og Jákup Mikkelsen, til eina samtykt, sum varð gjørd í Løgtinginum fyri einum ári síðani.

Tá samtykti Løgtingið at biðja Anniku Olsen seta ein arbeiðsbólk at eftirmeta valskipanina eftir at Føroyar vórðu skipaðar sum eitt valdømi.

Síðani skuldu málið leggjast aftur fyri Løgtingið at hava aðalorðaskifti um.

Men tað hendi onki í málinum og tað funnust fólkafloksmenninir í Norðoyggjum at.

Jákup Mikkelsen staðfesti, at Annika Olsen hevði sett seg upp ímóti tingsins vilja og tað helt hann vera álvarsamt.

Enn víðari fór Anfinn Kallsberg, tí hann hevði hug at geva landsstýriskvinnuni ein part av skylduni fyri, at fýra uppskot nú vóru til viðgerðar um valskipanina.

Hann helt, at hon hevði ligið sjóvarfallið av sær, tí hevði hon havt sett arbeiðsbólkin, høvdu vit sloppið undan øllum hesum uppskotunum.

Eisini Karsten Hansen úr Miðflokkinum fýltist á, at onki var gjørt við samtyktina um at endurskoðað valskipanina og floksfelagi hansara, Jenis av Rana, tók undir og helt, at eftirmetingin skuldi setast í verk.

### Ikki ráð og umstøður

Men hetta avsannaði Annika Olsen staðiliga.

Tað er onki dulsmál, at hon vil hava eitt valdømi.

Hon viðgekk eisini, at hon helt, at tað var ov tíðliga at eftirmeta valskipanina eftir at hon bert hevði virkað í eitt val.

Men hon legði dentin á, at tað var ikki orsøkin til, at arbeiðsbólkurin ikki varð settur.

Orsøkin var, at innlendismálaráðið hevði hvørki manning ella pening til at seta ein slíkan arbeiðsbólk.

Hon greiddi Løgtinginum frá, at hon hevði bæði verið noydd til at siga fólki upp og at fremja aðrar sparingar í innlendismálaráðnum og tí varð arbeiðsbólkurin ikki settur.

– Sostatt hevði eg ikki umstøður at seta ein vælskikkaðan arbeiðsbólk, segði hon.

Og hon helt, at skuldi nakað skilagott spyrjast burtur úr, var neyðugt, at talan var um ein vælskikkaðan bólk og ikki bara okkurt hissini.

Annars helt hon, at uppskotið um at seta eina nevnd at kanna, var skilagott.

# Fíggjarligur stuðul til politiskar flokkar skal almannakunngerast

**Tað eigur at vera kunngjørt alment, hvørjum teir politisku flokkarnir fáa fíggjarligan stuðul frá, heldur Andreas Petersen og landsstýriskvinnan í innlendismálum er ikki ósamd**

VALDØMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Almenningurin eigur at fáa at vita, hvørjum teir ymsu politisku flokkarnir fáa fíggjarligan stuðul frá.

Tað heldur Andreas Petersen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.

Tá ið Løgtingið í gjár viðgjørdi uppskotini um at broyta valskipanina, spurdi hann Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, um tað ikki var tørvur á at gera reglar fyri, at allur fíggjarligur stuðul til teir politiskur flokkarnar, skal almannakunngerast.

Hann vísti, at tað eigur at verða fult gjøgnumskygni í tí fíggjarliga stuðuli, sum flokkarnir fáa, so at almenningurin veit, hvønn stuðul, flokkarnir fáa og frá hvørjum hesin stuðulin kemur.

Tað fer at geva almenninginum innlit í, um nøkur serlig áhugamál eru knýtt at teimum ymsu flokkunum.

Hann sigur, at hetta er galdandi aðrastaðni, serliga er USA undangonguland, men hetta er eisini galdandi í Danmark.

Hann sigur, at í Danmark skulu fakfeløg og onnur gera roknskap fyri, hvørjum politiskum flokkum, tey stuðla.

– Viðhvørt eru seráhugamál knýtt at einum politiskum flokki og tað eigur veljarin at vita, heldur Andreas Petersen.

Tí heldur hann, at verður valskipanin endurskoðað, eigur hesin parturin eisini at verða tikin við í viðgerðini.

Annika Olsen var ikki ósamd í hesum.

– Eg haldi, at tað er skilagott at hava fíggjarligt gjøgnumskygni í, hvønn fíggjarligan stuðul flokkarnir fáa og frá hvørjum hesum stuðul kemur.

Hon helt, at samtykkir Løgtingið at seta ein arbeiðsbólk at kanna valskipanina, kann hetta verða ein partur av arbeiðssetningnum.